| Lønardeildin-vegleiðing | Dagur: 10. juni 2024 | Ár 2024 nr. 1 |
| --- | --- | --- |
| Til stovnar hjá landinum | FMR – j.nr. | |
| Heiti: Vegleiðing um barsil og ættleiðing | | |

Fíggjarmálaráðið vil við hesi vegleiðing greiða frá viðurskiftum, ið gera seg galdandi, tá ið starvsfólk, ið eru sett eftir sáttmála hjá Fíggjarmálaráðnum, gerast við barn, blíva pápi, sammóðir ella ættleiða.

Hesi viðurskifti eru skipað bæði í sáttmálum og í løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan.
Her skal verða gjørt vart við, at tað er Umhvørvis- og vinnumálaráðið, sum varðar av barsilslógini.

Vegleiðingin er skipað í 3 partar.

1. partur greiðir innleiðandi frá grundleggjandi rættindum hjá starvsfólki í sambandi við barnsburð og ættleiðing.
2. partur greiðir nærri frá sáttmálaviðurskiftum í sambandi við barnsburð og ættleiðing.
3. partur greiðir í stuttum frá viðurskiftum í barsilslógini, ið arbeiðsgevarin skal hava í huga.

Vegleiðingin vendir sær fyrst og fremst til almennar arbeiðsgevarar og starvsfólk, fevnd av almennum sáttmálum.

Fíggjarmálaráðið, Lønardeildin, 10. juni 2024

Jan Mortensen, lønarstjóri

# Innihald

1. Rættur til barsilsfarloyvi, barsilspening og løn ..... 4
1.1 Rættur til barsilsfarloyvi og barsilspening ..... 4
1.2 Rættur til løn í barsilsfarloyvi ..... 4
2. Rættindi sambært sáttmála ..... 5
2.1 Fráboðan ..... 5
2.2 Barnakonukanning ..... 5
2.3 Barsilsfarloyvi ..... 5
Óarbeiðsfør ..... 5
Heilsuvandi ..... 5
Eftir barnsburð ..... 5
2.4 Farloyvi til pápa ella sammóðir ..... 6
2.5 Ættleiðing ..... 6
2.6 Læknaváttan ..... 6
2.7 Sjúka og óarbeiðsføri fyri barnsburð ..... 6
2.8 Sjúka eftir barnsburð ..... 6
2.9 Sjúka eftir barsilsfarloyvi ..... 7
2.10 120-daga reglan ..... 7
2.11 Viðgerð fyri gitnaðarføri ..... 7
2.12 Misføðing ella barnið doyr ..... 7
2.13 Løn ..... 7
2.14 Skiftandi vaktir ..... 8
2.15 Avspákan ..... 8
2.16 Frítíð og frítíðarløn ..... 9
2.17 Summarfrítíð hjá lærarum ..... 10
2.18 Eftirlønargjald ..... 10
2.19 Starvsaldur ..... 10
2.20 Aftur í arbeiði ..... 10
2.21 Uppsøgn ..... 11
3. Rættindi sambært barsilslógini ..... 12
3.1 Fráboðan ..... 12
3.2 Rættindi framman undan barnsburði ..... 12
3.3 Vanlig rættindi eftir barnsburð ..... 13

Barsilsfarloyvi § 1 í barsilslógini ... 13
3.4 Serlig rættindi eftir barnsburð ... 13
3.5 Ættleiðing ... 14
3.6 Treytir fyri at fáa barsilspening ... 15
3.7 Umsókn um barsilspening: Arbeiðsgevari ... 15
3.8 Umsóknarfreist, umsókn og skjalprógv ... 15
3.9 Støddin á barsilspeninginum ... 15
3.10 Á arbeiðsmarknaðinum styttri enn 12 mánaðir ... 16
3.12 Tekur upp nýtt arbeiði ... 16
3.13 Fleiri arbeiðsgevarar ... 17
3.14 Flyting til Føroya og úr Føroyum ... 17
3.15 Fráboðanarskylda ... 17

# 1. Rættur til barsilsfarloyvi, barsilspening og løn

## 1.1 Rættur til barsilsfarloyvi og barsilspening

Øll starvsfólk hava sambært barsilslógini rætt til barsilsfarloyvi. Tað merkir, at tey í sambandi við viðgongu, barnsburð og ættleiðing hava rætt til at vera burtur úr arbeiði ávísa tíð, og at fráveran er lóglig.

## 1.2 Rættur til løn í barsilsfarloyvi

Starvsfólk, sum eru sett eftir sáttmála, kunnu eftir ásetingum í sáttmálanum hava rætt til fulla løn í parti av barsilsfarloyvistíðarskeiðinum.

Umframt barsilspening hava starvsfólk rætt til barsilspening, meðan tey eru í barsilsfarloyvi, um treytirnar í barsilslógini eru loknar. Barsilspeningur er peningur, sum Barsilsskipanin rindar starvsfólkinum.
Starvsfólk, sum hava rætt til løn í ávísum tíðarskeiði, hava ikki samstundis rætt til barsilspening tað tíðarskeiðið, ið løn verður goldin. Arbeiðsgevari, ið rindar løn til starvsfólk í barsilsfarloyvi, hevur rætt at søkja endurgjald fyri lønina, ið starvsfólki fær.

## 2. Rættindi sambært sáttmála

### 2.1 Fráboðan

Sambært sáttmála skal kvinnan boða arbeiðsgevara sínum frá í minsta lagi 3 mánaðir, áðrenn hon er sett at eiga.

Vantandi fráboðan kann í einstøkum førum vera mett sum brot á trúfestisskylduna.

### 2.2 Barnakonukanning

Frávera í sambandi við barnakonukanning er loyvd sambært barsilslógini og er haraftrat alment at meta sum lógligt forfall uttan lønarmiss.

### 2.3 Barsilsfarloyvi

Sambært sáttmála hevur starvskvinna rætt til barsilsfarloyvi við løn 4 vikur undan mettari føðing og í 24 vikur eftir føðing[1]. Kvinnan hevur rætt - men ikki skyldu - til at fara frá arbeiði við løn.

Óarbeiðsfør

Prógvar starvskvinnan við læknaváttan, at hon er óarbeiðsfør meir enn 4 vikur undan mettari føðing, verður hetta roknað sum vanlig sjúka, og starvskvinnan hevur tá rætt til løn undir sjúku. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, verður farið frá løn undir sjúku til barsilsfarloyvi við løn[2].

Heilsuvandi

Starvskvinna kann fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, um hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.

Eftir barnsburð

Eftir barnsburð hevur kvinnan rætt til 14 vikur við løn. Tíðarskeiðið til og við viku 14 er eitt verndar tíðarskeið fyri mammuna, ið er grundað á tørvin hjá mammuni at vera um barnið. Verndartíðarskeiðið merkir, at mamman hevur betri starvsrættindi enn pápin ella sammóðirin í hesum tíðarskeiði.

Eftir at tíðarskeiðið á 14 vikur er lokið, kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn til og við viku 24.

Eftir at tíðarskeiðið á 24 vikur er lokið, hevur annað foreldrið rætt til barsilspening sambært barsilslógini.

---

[1] Í nøkrum sáttmálum stendur, at starvskvinna hevur rætt til fulla løn, meðan hon er burtur frá arbeiði vegna barnsburðarfarloyvi, tó í mesta lagi í 8 vikur fyri føðingina og tilsamans í 24 vikur.

[2] Arbeiðsgevarin kann fáa barsilspeningur veittan upp til 8 vikur undan mettari føðing, um kvinnan við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur og/ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum. Arbeiðsgevarin hevur tá rætt til barsilspening upp til 8 vikur undan mettari føðing.

Sambært barsilslógini hava foreldrini rætt til 56 vikur av barsilsfarloyvi tilsamans, sum skulu brúkast innan fyri tær fyrstu 52 vikurnar eftir barnsburð. (Tey kunnu halda 4 vikur samstundis; tí rúmast 56 vikur við farloyvi innanfyri 52 vikur.) Hendan rættin hava tey, óansæð um tey hava rætt til barsilspening. Og tey missa ikki starvsaldur.

### 2.4 Farloyvi til pápa ella sammóðir

Pápin ella sammóðirin hevur rætt til barsilsfarloyvi í 4 vikur innan fyri tær fyrstu 52 vikurnar eftir barnsburð[3] og skulu hesar vikurnar haldast samstundis sum mamman er í barsil.

Tíðarskeiðið eftir 14. viku er fevnt av líkskaparregluni og mismunur vegna kyn er ikki loyvdur. Tað merkir, at eftir 14. viku hevur pápin ella sammóðirin eins góðan rætt til løn, barsilsfarloyvi og barsilspening sum mamman, tó ikki samstundis.

### 2.5 Ættleiðing

Flestu sáttmálar hjá Fíggjarmálaráðnum hava hesa ella líknandi áseting:

"Starvsfólk, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp til 4 vikur áðrenn, tey fáa barnið, og í 24 vikur tilsamans. Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín. Rætturin til fráveru við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í samband við, at tey fáa barnið. Foreldrini kunnu ikki vera í farloyvi við løn samstundis eftir hesi grein".

Haraftrat hava foreldrini rættindi í barsilslógini.

Í sambandi við ættleiðing er einki verndartíðarskeið at hugsa um, og tí heldur ikki loyvt mammuni at hava betri starvsrættindi enn pápanum ella sammóðirini.

### 2.6 Læknaváttan

Krevur arbeiðsgevarin læknaváttan, er mannagongdin tann, at starvsfólkið vendir sær til sín egna lækna, ið útvegar læknaváttan, ið arbeiðsgevarin rindar fyri.

### 2.7 Sjúka og óarbeiðsføri fyri barnsburð

Sjúka ella óarbeiðsføri fyri barnsburð er at meta sum lógligt forfall.

Er talan um viðgongutreytaða sjúku ella viðgongutreytað óarbeiðsføri, kann arbeiðsgevarin eisini søkja um endurgjald frá Barsilsskipanini fyri tað tíðarskeiðið, tá ið mett verður, at 8 vikur eru eftir til føðing.

### 2.8 Sjúka eftir barnsburð

Sjúka leingir ikki um barsilsfarloyvistíðarskeiðið. Tað merkir, at ein kvinna við sáttmálaásettum rætti til løn í barsilsfarloyvi, ið t.d. fer í barsil 8 vikur fyri barnsburð og verður sjúk í 4 vikur eftir barnsburð, ikki fær rætt til barsilsfarloyvi við løn longt við 4 vikum upp í 28 vikur tilsamans.

[3] (Barsilslógin §1. stk. 2) (Í sáttmálunum stendur einki um farloyvi hjá pápanum ella sammóðirini)

### 2.9 Sjúka eftir barsilsfarloyvi

Í einari møguligari uppsagnartilgongd seinni skulu einans teir sjúkradagar, ið eru aftaná barsilsfarloyvið, teljast við í samlaðu fráveruna hjá starvsfólkinum.

### 2.10 120-daga reglan

Er avtala gjørd um, at uppsøgn kann fremjast eftir 120 sjúkradagar, skulu sjúkradagar, ið hava samband við viðgongu og barnsburð, ikki verða taldir við.

### 2.11 Viðgerð fyri gitnaðarføri

Hevur starvsfólk fráveru í sambandi við læknakanningar ella viðgerð, ið hava til endamáls at staðfesta gitnaðarførið og / ella viðgera starvsfólkið við tí fyri eyga at betra um gitnaðarførið, er talan um sjúkrafráveru, ið kemur undir vanligu reglurnar um løn undir sjúku.

Fer eitt starvsfólk í viðgerð fyri barnloysi við tí fyri eyga at gerast við barn (fertilitetsviðgerð), hevur starvsfólkið rætt til fráveru vegna sjúku /sjúkraviðgerð, um viðgerðin er neyðug vegna sjúku (okkurt er órættvorðið, ið forðar fyri viðgongu), ið er staðfest í oman fyri nevndu kanningum av gitnaðarførinum.

Verður starvsfólkið sjúkraskrivað eftir viðgerð fyri barnloysi, er talan um fráveru, ið kemur undir vanligu reglurnar um løn undir sjúku. Tá starvsfólk er burturstatt vegna viðgerð fyri barnloysi, skal arbeiðsgevarin hava læknaváttan frá avvarðandi serlækna. Nýggj læknaváttan skal fyriliggja hvørja ferð farið verður undir eina viðgerð.

Starvsfólk, ið eru í viðgerð fyri barnloysi, eru vard móti uppsøgn av javnstøðulógini.

### 2.12 Misføðing ella barnið doyr

Tað veldst um eina læknaliga meting, um talan er um barnsburð, har barnið doyr, ella um misføðing.

Frávera í sambandi við misføðing er lógligt forfall og gevur sum meginregla rætt til løn undir sjúku.

Doyr barn í móðurlívi ella er deyðføtt, hava foreldrini somu rættindi, sum var tað livandi. Treytin er, at lækni váttar, at talan er um barnsburð.

### 2.13 Løn

Hugtakið "løn" verður sum meginregla skilmarkað eins, sama um talan er um løn undir sjúku, løn undir frítíð ella løn undir barsil.

Í sáttmálunum við Fíggjarmálaráðið er galdandi, at starvsfólk fáa fulla løn, nýta tey rætt sín til barsilsfarloyvi.

Full løn fevnir fyrst og fremst um:

- Føstu lønina
- Viðbøtur – varandi og fyribils – ið verða latnar við einari fastari mánaðarligari upphædd

- Møgulig eftirlønargjøld

Haraftrat kunnu broytiligar viðbøtur, t.e. viðbøtur, ið ikki verða latnar við einari fastari mánaðarligari upphædd, eisini vera fevndar av fullu lønini.

Hesar broytiligu viðbøtur kunnu t.d. vera:

- Viðbót fyri ólagaliga arbeiðstíð
- Viðbót fyri ólagaligan starvshátt
- Reiðiviðbót

Treytin fyri at broytilig viðbót verður íroknað sum partur av vanligu lønini hjá starvsfólkinum er, at viðbótin støðugt er væntandi.

Viðbótin er mett sum støðugt væntandi, er ein av niðanfyristandandi treytum lokin:

- Starvsfólkið sambært sínum setanarbrævi nágreiniliga er sett til arbeiði, ið gevur rætt til broytiliga viðbót og í roynd og veru útinnir hetta arbeiði.
- Starvsfólkið regluliga og leingi – í minsta lagi ½ ár – í roynd og veru hevur útint tílíkt arbeiði.

Gjald fyri yvirarbeiði og meirarbeiði annars, skal ongantíð roknast upp í vanligu lønina. Hetta sjálvt um starvsfólkið leingi hevur fingið gjald fyri yvir- og meirarbeiði, og at hetta gjald meir ella minni støðugt hevur verið væntandi.

Veitingar fyri ymsar útreiðslur, eitt nú ferða-, tíma- og dagpengar, skulu ongantíð roknast upp í vanligu lønina.

## 2.14 Skiftandi vaktir

Tá ið 8 vikur eru eftir til føðing, kann arbeiðsgevarin umleggja vaktarskipanina soleiðis, at kvinnan sleppur undan kvøldvaktum og náttarvaktum, heilt ella partvíst.

Kvinnan skal tá varðveita lønina, sum varð vaktarskipanin ikki løgd um.

Sí "Rundskriv um barnakonur, sum arbeiða í skiftandi vaktum" á www.fmr.fo

## 2.15 Avspákan

Avspákan kann til dømis verða vunnin sum samsýning um kvøldið og um náttina: eitt nú 3 tímar frí fyri hvørjar 40 tímar í kvøldvakt.

Barsilsfarloyvi er lógligt forfall og tí verður avspákan vunnin, sum var viðkomandi til arbeiðis, treytað av, at avspákanin er støðugt væntandi.

Avspákan, ið av røttum skuldi verið avgreidd í tíðarskeiðinum, tá ið starvsfólkið er í barsilsfarloyvi, verður ikki givin av nýggjum.

Dømi: Starvsfólk, ið arbeiðir 40 tímar kvøldvakt, vinnur sær 3 tímar í avspákan.

Starvsfólkið er í barsilsfarloyvi ta vikuna, arbeitt skuldi verið í kvøldvakt, men vinnur avspákan undir lógligum forfalli og hevur tí rætt til teir 3 frítímarnar.

Starvsfólkið er hinvegin eisini í barsilsfarloyvi vikuna, tá ið teir 3 frítímarnir skuldu avspákast, og tí falla teir burtur.

Avspákan er í tílíkum føri bæði vunnin og mist undir lógligum forfalli og verður ikki givin av nýggjum.

## 2.16 Frítíð og frítíðarløn

Burturvera frá arbeiðinum vegna barnsburð skal ikki verða frádrigin við uppgerðini av starvstíðini, sum gevur rætt til frítíð. Starvsfólk fáa frítíðarløn, tá ið tey eru heima í barnsburðarfarloyvi við løn[4].

Barsilsfarloyvi er haraftrat ein frítíðarforðing, ið merkir, at arbeiðsgevarin ikki kann krevja, at frítíðin skal verða hildin, meðan starvsfólkið er í barsilsfarloyvi. Tó kann frítíðin verða hildin, vil starvsfólkið tað. Verður frítíðin ikki hildin, hevur starvsfólkið rætt til aðra frítíð.

Dømi: Eigur kvinnan, áðrenn frítíðin skal haldast, hevur hon rætt til aðra frítíð.

Eigur kvinnan, tá ið hon er farin í frí, hevur hon, vegna hesar serligu umstøður, rætt at halda írestandi frítíðina seinni.

Frítíðarløn verður fingin av barsilspeninginum. Hon verður funnin við at býta barsilspeningin, áðrenn hann verður útgoldin, við 1,12.[5].

Dømi: Upphæddin á barsilspeninginum er 10.000 kr.

10.000 býtt við 1,12, t.e. 8.929 kr. verða goldnar út sum barsilspeningur og 1.071 kr. verða rindaðar sum frítíðarløn eftir frítíðarlógini. Frítíðarlønin verður flutt í Frítíðargrunnin, og verður útgoldin 1. mai árið eftir.

Fyri arbeiðsgevaran verður ikki rindað fyri frítíð við løn, frítíðaránskoyti og frítíðarløn, sum starvsfólkið í barsilsfarloyvistíðarskeiðinum vinnur sær rætt til eftir frítíðarlógini.

---

[4] §5 *2. stk.* [1)] Burturvera frá arbeiðinum vegna sjúku, vanlukku, fyribils arbeiðssteðg av rakstrarligum ávum ella frítíð eftir hesari løgtingslóg, eins og burturvera vegna barnsburð skal ikki verða frádrigin við uppgerðini av starvstíðini, sum gevur rætt til frítíð.

[5] §14a. stk.1-2

## 2.17 Summarfrítíð hjá lærarum

Sambært áseting í sáttmálunum við Føroya Lærarafelag og Musikklærarafelag Føroya har summarfrítíðin er føst, er tað galdandi, at fellur partur av teimum 24 vikunum í barsilsfarloyvinum í summarfrítíðini, verður barsilsfarloyvið longt samsvarandi.
Tó kann barsilsfarloyvið ikki leingjast meiri enn 5 vikur.
Hóast ásetingin bara er at finna í hesum báðum sáttmálum, metir Fíggjarmálaráðið, at hetta er eisini galdandi á almennum grundarlagi fyri teir lærarar, ið fevndir eru av øðrum sáttmálum.

## 2.18 Eftirlønargjald

Sáttmálaásett eftirlønargjald verður goldið, tá ið starvsfólk er í barsilsfarloyvi við løn.
Arbeiðsgevarin rindar ikki eftirlønargjald, tá ið starvsfólk er í barsilsfarloyvi við ongari løn.

## 2.19 Starvsaldur

Starvsaldur verður vunnin, bæði tá ið starvsfólk er í barsilsfarloyvi við løn og við ongari løn.
Sambært § 5 í barsilslógini verður tíðarskeiðið, tá ið starvsfólkið er í barsilsfarloyvi, roknað sum vanlig arbeiðstíð, tá ið starvsaldurin skal roknast og ikki kann víkjast frá hesum til bága fyri starvsfólkið.

## 2.20 Aftur í arbeiði

Starvsfólk, ið koma aftur úr barsilsfarloyvi, hava eftir sáttmálunum antin rætt til at byrja aftur í starvinum, ið tey høvdu frammanundan ella í einum í tign og innihaldi sambæriligum starvi.
Arbeiðsgevarin hevur tó, sum liður í leiðslurætti sínum, loyvi at fremja ávísar broytingar í starvsviðurskiftunum hjá starvsfólkinum. Eigur starvsfólkið at tola slíkar broytingar í vanligum førum, eiga broytingarnar eisini at verða toldar í serligum førum, eitt nú tá starvsfólkið hevur nýtt rætt sín til barsilsfarloyvi.
Eru broytingarnar av týðandi slagi ella eru uppsagnarstig tikin, hevur tað týdning, um avgerðin um hetta er tikin í barsilsfarloyvinum, ella um hon er tikin, tá ið viðkomandi er komin aftur í arbeiði.
Er avgerðin tikin í barsilsfarloyvinum, skal arbeiðsgevarin prógva, at avgerðin um týðandi broytingar ella avgerðin um uppsøgn er ikki grundað á barsil ella viðgongutíð.
Er avgerðin tikin, tá ið viðkomandi er komin aftur til arbeiðis, er prógvbyrðan býtt millum partarnar.
Hetta merkir, at starvsfólkið fyrst skal vísa á tær veruligu umstøðurnar, ið geva orsøk at halda, at beinleiðis ella óbeinleiðis mismunur er framdur. Arbeiðsgevarin skal síðan prógva, at líkskaparreglan er ikki brotin.

### 2.21 Uppsøgn

Javnstøðulógin verjir bæði foreldrini móti uppsøgn, ið beinleiðis ella óbeinleiðis er grundað á viðgongutíð, barnsburð ella ættleiðing.

Lógin forðar ikki fyri, at arbeiðsgevari sigur starvsfólk úr starvi, er uppsøgnin grundað á onnur viðurskifti enn viðgongutíð, barnsburð og ættleiðing. Verður starvsfólk sagt upp, er próvbyrðan øvut og arbeiðsgevarin skal tí prógva, at slík onnur viðurskifti eru sakliga grundað.
Sí annars "Vegleiðing um uppsøgn" á www.fmr.fo.

## 3. Rættindi sambært barsilslógini

Hesin partur skal takast við tí fyrivarni, at tað er Barsilsskipanin, ið fyrisitur, tulkar og tekur avgerðir í sambandi við barsilslógina. Tó metir Fíggjarmálaráðið, at viðurskifti eru í barsilslógini, ið arbeiðsgevarin skal hava í huga. Hesi eru tí í stuttum tikin við í hesa vegleiðing. Eru ivamál um barsilslógina, skal arbeiðsgevarin venda sær til Barsilsskipanina, men hann skal venda sær til Fíggjarmálaráðið við ivamálum um sáttmálaásetingar.

### 3.1 Fráboðan

Mamman skal boða arbeiðsgevara sínum frá, nær hon kann byrja at arbeiða aftur. Tað skal verða gjørt innan 8 vikur eftir barnsburð[6].

Pápin ella sammóðirin skal í seinasta lagi 4 vikur frammanundan, at hann/hon ætlar sær at verða burtur frá arbeiði, boða arbeiðsgevara sínum frá tí[7].

Somu fráboðanarskyldur eru galdandi fyri foreldur, ið ættleiða.

### 3.2 Rættindi framman undan barnsburði

Kvinna hevur rætt til barsilsfarloyvi og barsilspening, tá ið 4 vikur eru eftir til barnsburðin.

Hevur kvinnan fingið ásett ein dag fyri keisaraskurð, hevur hon rætt til barsilspening, tá ið 4 vikur eru eftir til skurðviðgerðina.

Um kvinna eigur áðrenn hon er sett, hevur hon ikki rætt til barsilspening fyri tíðarskeiðið, sum er eftir til metta føðing.

Kann kvinnan við læknaváttan prógva, at frávera er neyðug vegna heilsuvanda fyri hana ella ófødda barnið, hevur hon rætt til barsilsfarloyvi, tá ið 13 vikur eru eftir til barnsburðin og rætt til barsilspening, tá ið 8 vikur eru eftir til barnsburðin. Arbeiðsgevarin rindar læknaváttanina fyri tíðarskeiðið 13 til 8 vikur undan mettari føðing. Læknaváttanir fyri tíðarskeiðið 8 til 4 vikur fyri mettan barnsburð rindar barsilsskipanin.

[6] § 3, stk. 1 í barsilslógini
[7] § 3, stk. 2 í barsilslógini

### 3.3 Vanlig rættindi eftir barnsburð

Eftir barnsburðin eru tær fyrstu 14 vikurnar eitt verndartíðarskeið fyri mammuna. Barsilspeningurin og barsilsfarloyvið, ið mamman hevur rætt til í hesum tíðarskeiði, kann ikki býtast við pápan ella sammóðirna.

Barsilsfarloyvi § 1 í barsilslógini

Tær 14 vikurnar við barsilsfarloyvi, sum eru markaðar mammuni, skulu haldast tær fyrstu 14 vikurnar eftir barnsburð. Pápin kann halda sínar 4 vikur við barsilsfarloyvi, tá ið hann vil innan fyri tær fyrstu 52 vikurnar eftir barrnsburð; hesar vikurnar kunnu nýtast, samstundis sum mamman eisini er í barsilsfarloyvi. Harafturat hava foreldrini 38 vikur við barsilsfarloyvi, sum tey kunnu býta sínámillum aftaná 14. viku eftir barnsburð. Hesar vikurnar kann bara ein teirra nýta í senn. Brúka tey allar vikurnar við barsilsfarloyvi, skulu 4 av vikunum haldast samstundis, tí alt barsilsfarloyvið skal vera hildið innan fyri tær fyrstu 52 vikurnar eftir barnsburð.

*Um mamman doyr*

Um so er, at mamman doyr, ella læknaváttan staðfestir, at mamman vegna álvarliga sjúku ikki er før fyri at taka sær av barninum, hevur faðirin ella sammóðirin rætt til barsilsfarloyvi í upp til og innan fyri 52 vikur eftir barnsburð.

*Tví- ella fleirburðar*

Er talan um tví- ella fleirburðar verða 4 vikur lagdar afturat teimum 38 vikunum við barsilsfarloyvi, sum foreldrini kunnu býta sínámillum.

*Áðrenn viku 32 í viðgonguni*

Verður barn ella børn fødd áðrenn 32. viku í viðgonguni, verða 8 vikur lagdar afturat teimum 38 vikunum við barsilsfarloyvi, ið foreldrini kunnu býta sínámillum.

### 3.4 Serlig rættindi eftir barnsburð

Er mamman einsamøll við barninum, hevur hon rætt til tann barsilspeningin, ið serliga er ætlaður pápanum ella sammóðrini.

Einsamøll merkir, at foreldrini eru ikki í parlagi.

Treytin fyri tí er, at pápin ella sammóðurin ikki samstundis er frá arbeiði við løn í sama tíðarskeiði.

Foreldrini kunnu tó avtala sínámillum, í hvønn mun tey vilja, at hetta býti av barsilspeninginum skal vera galdandi.
Sama er galdandi, er pápin ella sammóðirin einsamøll við barninum[8].

Dømi: Mamman ávikavist pápin ella sammóðirin fær eftir barnsburðin barsilspening í 14 vikur + 34 vikur + 4 vikur = 52 vikur samanlagt.

Doyr mamman, ella læknaváttan staðfestir, at mamman vegna álvarsliga sjúku ikki er før fyri at taka sær av barninum, hevur pápin ella sammóðirin rætt til barsilspening í 52 samanhangandi vikur eftir barnsburðin og barsilsfarloyvi í 52 vikur eftir barnsburðin[9].

Barsilslógin umrøður ikki tey førini, har barnið er deyðføtt ella doyr í barsilsfarloyvistíðarskeiðinum. Hóast hetta hevur Barsilsskipanin ta praksis, at foreldur hava somu rættindi, sum tá ið talan er um livandi børn. T.v.s., at rætturin til barsilsfarloyvi og barsilspening er tengdur at, um talan er um eina føðing. Tað er ein læknaligur spurningur, hvørt talan er um eina føðing ella eina misføðing (abort).

1. januar 2023 kemur ein broyting í almannalógini í gildi, sum hevur við sær, at foreldur kunnu fáa endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, tá barn yngri enn 18 ár doyr ella er deyðføtt. Hereftir verður tað Almannaverkið, ið rindar endurgjald fyri mista arbeiðsinntøk og ikki Barsilsskipanin

## 3.5 Ættleiðing

Sambært §2 í barsilslógini

Foreldur, ið eru løntakarar og ættleiða barn, hava rætt til barsilsfarloyvi í upp til 4 vikur áðrenn, tey fáa barnið, og 56 vikur eftir, at tey hava fingið barnið.

Sambært §10 í barsilslógini

Foreldur hava rætt til barsilspening tilsamans í 52 vikur, eftir at tey hava fingið barnið og upp til 4 vikur í part, áðrenn tey hava fingið barnið.

Sambært §2, stk.3 og § 10, stk. 3

Tó kunnu foreldrini innan fyri tær fyrstu 56 vikurnar eftir, at tey hava fingið barnið, fáa barsilspening og barsilsfarloyvi í 4 vikur, ið kann nýtast í senn.

[8] §9. stk 5
[9] §9. stk 4

Rætturin til barsilsfarloyvi og barsilspening er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur avgjørt, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í sambandi við, at tey fáa barnið.

### 3.6 Treytir fyri at fáa barsilspening

Starvsfólk hava rætt til at søkja barsilspening, hava tey fastan bústað í Føroyum umframt fulla skattskyldu í Føroyum. Haraftrat er tað ein treyt, at starvsfólkið hevur havt A-inntøku, ið kann nýtast sum útrokningargrundarlag undir barsilspeninginum[10].

### 3.7 Umsókn um barsilspening: Arbeiðsgevari

Í tann mun arbeiðsgevari rindar A-inntøku í sambandi við barsilsfarloyvi, verður barsilspeningurin, sum løntakarin hevði havt rætt til, rindaður arbeiðsgevaranum[11].

Fyri arbeiðsgevarar hjá landinum er tað haraftrat ein treyt fyri at fáa endurgjald fyri løn undir barsilsfarloyvi, at avloysari verður settur fyri tann, ið fer í barsilsfarloyvi[12].

### 3.8 Umsóknarfreist, umsókn og skjalprógv

Starvsfólk skal søkja um barsilspening innan 1 ár eftir barnsburð ella 1 ár eftir, at foreldur hava fingið ættleitt barn[13].
Er umsóknin ikki latin innan hesa freist, fellur rætturin til barsilspening burtur.
Arbeiðsgevari, ið hevur rætt til endurgjald fyri løn undir barsilsfarloyvi, skal halda somu freist[14].

Viðvíkjandi sjálvari mannagongdini í sambandi við umsóknina og skjalprógvum til hesa, verður víst til Barsilsskipanina www.barsil.fo

### 3.9 Støddin á barsilspeninginum

Barsilspeningurin verður sum meginregla roknaður eftir miðal A-inntøkuni seinastu 12 mánaðirnar, roknað frá degnum fyri, at fráveran byrjar og 12 mánaðir aftur[15]. Verður seinasta lønin útgoldin eftir, at barsilsfarloyvið er byrjað, kann starvsfólkið senda Barsilsskipanini avrit av seinasta lønarseðilinum og sostatt fáa lønina tikna við í útrokningargrundarlagið undir barsilspeninginum.

---

[10] § 8. stk. 2-3 í barsilslógini
[11] §15
[12] §15a
[13] §14, stk. 1
[14] § 4, stk. 5 í kunngerð nr. 91 frá 31. mai 2001 um umsiting av Barsilsskipan
[15] §12

Útrokningargrundarlagið kann tó í mesta lagi vera hámarksupphæddin fyri mánaðarliga barsilspeninginum, sum er 25.000 kr.

Barsilspeningurin er 100% av útrokningargrundarlagnum, tó ongantíð meiri enn 25.000 kr. um mánaðin[16].

### 3.10 Á arbeiðsmarknaðinum styttri enn 12 mánaðir

Hevur starvsfólkið beint undan barsilsfarloyvinum verið á arbeiðsmarknaðinum styttri enn 12 mánaðir, verður barsilspeningurin roknaður við grundarlagi í tí tíðarskeiðinum. Barsilspeningurin verður tá funnin við at býta við øllum døgunum í arbeiðstíðarskeiðnum[17].

Dømi: Hevur starvsfólkið verið á arbeiðsmarknaðinum í 4½ mánað, verður støddin á barsilspeninginum funnin við at býta inntøkuna við 4,5.
Hevur starvsfólkið verið á arbeiðsmarknaðinum í styttri enn 3 mánaðir, verður tíðarskeiðið tó altíð býtt við 3 mánaðum. Tað merkir, at hevur starvsfólkið verið á arbeiðsmarknaðinum í 1 mánað, verður lønin býtt við 3.

### 3.12 Tekur upp nýtt arbeiði

Ein, ið tekur nýtt lønandi arbeiði, ið meðan viðkomandi fær barsilspening, skal rinda barsilspeningin aftur. Er barsilspeningur goldin arbeiðsgevara, skal persónurin eisini rinda Barsilsskipanini barsilspeningin aftur.

Um persónurin ger arbeiði fyri arbeiðsgevara, ið meðan arbeiðsgevarin rindar løn undir barsilsfarloyvi og móttekur barsilspening frá Barsilsskipanini, skal arbeiðsgevarin rinda Barsilsskipanini barsilspeningin aftur.

Kravið um afturrindan av barsilspeningi kann eisini fremjast við at mótrokna møgulig krøv frá arbeiðstakara ella arbeiðsgevara upp á barsilspening, og peningurin kann eisini krevjast inn við at afturhalda í løn og við panting.

[16] §13
[17] § 2 í kunngerð nr. 91 frá 31. mai 2001 um umsiting av Barsilsskipan

### 3.13 Fleiri arbeiðsgevarar

Rinda fleiri arbeiðsgevarar løn til sama starvsfólk, ið er í barsilsfarloyvi, og verður endurgjaldið ikki fult til hvønn teirra, verður endurgjaldið roknað við at býta mánaðarlønina frá arbeiðsgevaranum við mánaðarlønirnar frá øllum arbeiðsgevarum faldað við 25.000.

### 3.14 Flyting til Føroya og úr Føroyum

Starvsfólk, sum flyta millum Norðurlond, varðveita sambært norðurlendskari konvensjón annaðhvørt rættin til barsilspening ella rættin at taka útrokningargrundarlagið við sær.

Hevur starvsfólk, ið er flutt til Føroya, rætt til barsilspening úr øðrum landi, hevur starvsfólkið ikki samstundis rætt til barsilspening úr Føroyum.

Flyta starvsfólk úr Føroyum, hava tey ikki rætt til barsilspening í Føroyum.

### 3.15 Fráboðanarskylda

Starvsfólk hava skyldu til at boða Barsilsskipaninn frá øllum broytingum, ið kunnu hava týdning fyri barsilspeningin, t.d. um starvsfólkið flytur av landinum ella fer til arbeiðis.

Brot á hesa skyldu kann elva til, at útgoldin barsilspeningur verður kravdur inn aftur.

Hevur arbeiðsgevari rætt til at søkja endurgjald fyri løn undir barsilsfarloyvi, skal hann somuleiðis boða Barsilsskipanini frá øllum broytingum, ið kunnu hava týdning fyri endurgjaldið, t.d. um starvsfólkið er farið úr starvi ella starvsfólkið fer til arbeiðis í tíðarskeiðinum, barsilsfarloyvið varir.

□